## Opið hús á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya

10. apríl frá kl 10 – 15 skripa lesandi á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya fyri einum tiltaki at varpa ljós á útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing – ætlað næmingum í 9. og10. flokki og næmingum í miðnámsskúlunum,s júkrarøktarfrøðingum og kliniskum vegleiðarunum. Tey halda, athendan útbúgvingin er ein spennandi ferð inn í vitanina um menniskjað og letur hurðina upp til ótalligar valmøguleikar. - Útbúgvingin gevur nógvar møguleikar fyri spennandi størvum, bæði innan heilsuøkið og aðrastaðni í samfelagnum, serútbúgvingum innan ymisk sjúkrarøktarøkir, víðariútbúgving á master/kandidatstøði bæði innan sjúkrarøkt og onnur líknandi fak, siga fyrireikararnir. Útbúgvingin er á altjóða støði og gevur soleiðis bæði møguleika fyri víðarilesnaði og arbeiði uttanlands. Sum lesandi hevur tú eisini møguleika fyri at taka partar av útbúgvingini uttanlands.



# r høvundar

kann henda fyri okkara bókmentir, heldur Kim Simonsen.

Sambært Carl Jóhan Jensen er Ísland kanska besta dømi um, at bókmentir hjá smáum tjóðum væl kunnu gera seg galdandi úti í heimi. Hann greiðir frá, at hvørja ferð ein av 20 teimum fremstu íslendsku rithøvundunum gevur eina bók út, kann hann vænta, at hon er týdd til eini seks mál innan tvey ár.

- Íslendingar hava dugað at bjóða útlendskum høvundum til Íslands. Afturfyri hava teir so skapt áhuga og gróðarlíkindi fyri íslendskum bókmentum úti í heimi. Innsig skapar jú útsig – men tað hava vit heldur tungt við at fata í Føroyum, heldur hann.

### Tey ungu halda seg aftur

Carl Jóhan Jensen minnir á, at líka síðani miðøld hava heimins bókmentir verið í samskifti við hvønnannan. Tað er hetta bókmentaliga umrenslið, sum hevur skapt ta áhaldandi menningina og endurnýggjanina, sum føroyskar bókmentir mugu gerast partur av. Hendir tað ikki, steðgar menningin av føroyskum bókmentum stutt sagt upp.

- Eg eri bangin fyri, at tað er júst tað, sum er í ferð við at henda. Í løtuni er tað ómetaliga lítið, sum eggjar føroyskum høvundum at skriva. Ivaleyst er tað eisini orsøkin til, at so fá av teimum ungu tíma at bjóða seg fram sum høvundar, sigur Carl Jóhan Jensen.

Eisini Kim Simonsen hevur varnast, at ungir høvundar eru lítið at hóma.

- Tað sigur seg næstan sjálvt. Longu sum er berjast føroyskir rithøvundar um alsamt færri molar, og tí er tað nærum ógjørligt hjá nýggjum, ungum rithøvdundum at gera seg galdandi. Tí er tað alneyðugt at vit víðka føroyska bókamarknaðin, um føroyskum bókmentum skal verða lív lagað, staðfestir Kim Simonsen.





# Ársins Songrødd finalan verður á Kambsdali

**Eingin í høvuðsstaðnum vil hýsa Ársins Songrøddini – tí verður finalan á Kambsdali**

SONGRØDDIN
*Tíðindaskriv*

Annað umfar av Ársins Songrødd hevur verið í TB-húsinum á Tvøroyri. Nógv fólk komu at hoyra teir sjey luttakararnar og teirra framførslur á pallinum. Tað Janus Wiberg Mortensen, John Holm og Vivian Skyt sum tryggjaðu sær pláss í finaluna leygarkvøldið tann 3. mai í høllini á kambsdali.

Suðuroyingar vóru sum altíð í góðum hýri og tóku væl ímóti Ársins Songrødd 2008, og suðringar slóu tað enn einaferð fast við sjey tummaseymi, at teir hava tað bestu áskoðarafjøldina í landinum.

Komandi leygarkvøld gongur leiðin norðurum aftur. Triðja og seinasta umfarið verður í Høllini á Kambsdali nú leygarkvøldið 12. apríl.

- Tað var ætlanin at hava eitt undanumfar í Havn, har sera nógvir luttakarar hava teknað seg til kappingina, men Tórshavnar býráð hevur enn ikki latið hoyra frá sær. Søgan er annars tann, at fyrireikararnir fingu at vitað, at "nevndin" hevði avgjørt, ikki at brúka Badmintonhøllina, og Ítróttarhøllina á Hálsi til ungdómstiltøk, t. e. dansur o.a., sigur Mark Joensen, sum er ein av fyriskiparunum.

Hann sigur, at trupulleikin er, at tey bæði støðini eru tey einastu hølini sum hava verið brúkt til at hýsa eina nóg stóra áskoðarafjøld, t.e, tá ið tiltøk fyri ung undir 18 ár hava verið.

- Tískil bóðu fyrireikararnir í nóg góðari tíð, um eykaloyvi til at hava eitt umfar av Ársins Songrødd í Ítróttarhøllini á Hálsi, júst tí at tiltakið í stóran mun kann bólkast sum eitt ungdóms- og mentunartiltak, og at nóg gott pláss mátti verða fyri áskoðararnar.

- Ársins Songrødd hevur verið lopfjøll hjá nógvum tónleikarum sum ríka okkum tónlistarliga hvønn dag, og tí eigur hetta tónleika– og mentanartiltakið at fáa innivist í høvuðstaðnum Tórshavn, siga fyrireikararnir, heldur hann.

Men ikki hevur borið til at fingið, hvørki játtandi ella noktandi svar frá Tórshavnar Býráð. Tískil verður undanumfarið sum annars skuldi vera í Havn, flutt á Kambsdal.

Mark Joensen sigur, at ein spennandi SMS kapping er í samband við Ársins Songrødd, har hópin av vinningum er upp á spæl, eitt nú ein spildurnýggjur scootari, atgongumerki til Bryan Adams, atgongumerki til summarfestivalin og annars nógvir aðrir mega feitir vinningar. Man skal bert sms'a "sang" til 1919, og so er man við í kappingini.

# Atle Dyregrov í Miðlahúsinum

FYRILESTUR

Hóskvøldið 10. apríl kl. 19.00 bjóðar Synergi til fyrilestur í Miðlahúsinum við kenda norska sálarfrøðinginum, Dr. Atle Dyregrov.

Í fyrilestrinum kemur Atle Dyregrov inn á hesi evni:

- Tá eitt barn doyr – sorg í familjuni
- Sorg hjá børnum – annarleiðis enn hjá vaksnum?
- Hvussu kann ein hjálpa sínum børnum, tá ein sjálvur er í sorg?

Fyrilesturin er ókeypis og er ætlaður foreldrum, sum hava mist eitt barn, og avvarandi. Tilmelding er ikki neyðugt, men tó er avmarkað pláss.

Um Atle Dyregrov: Dr. Phil. Atle Dyregrov varð útbugvin sálarfrøðingur í 1980 og er serfrøðingur í kliniskari sálarfrøði.

Hann hevur starvast í fleiri ár við tilknýti til "Barneklinikken, Haukeland sykehus", har hann fyri tað mesta hevur havt ábyrgd fyri uppfylging av familjum, sum hava mist børn. Síðani hevur hann arbeitt í 4 ár sum granskari á "Forskningssenter for Arbeidsmiljø, Helse og Sikkerhet" (FAHS) við universitetið í Bergen. Har hevur hann arbeitt bæði praktiskt og granskingarligt við kreppum, vanlukkum og tilbúgvingarætlanum.

Síðani 1988 hevur hann verið dagligur leiðari fyri "Senter for Krisepsykologi" og starvast við kreppum í gerandislívinum. Serliga hevur hann fingist nógv við børn sum uppliva sorg og trauma. Harafturat hevur hann sum spesialistur arbeitt við fleiri størri kreppum og vanlukkum í bæði inn- og útlandi, og hevur verið ráðgevi fyri Reyða Kross, Red Barnet, FN og Unicef.

Atle Dyregrov hevur skrivað eina røð av bókum, har fleiri teirra eru umsettar til nógv ymisk mál og verður nýttar sum lærubøkur.

Øll eru vælkomin til fyrilesturin, sigur Synergi, sum fyrireikar tiltakið.